# Jørgen Niclasen: - Avgerðin var okkara

**Jørgen Niclasen vísir aftur, at Fólkaflokkurin varð trýstur at koyra Jógvan við Keldu úr landsstýrissessinum av hinum samgonguflokkunum og løgmanni.**
**- Avgerðin var okkara, og so má tíðin vísa, um hon var hin rætta, sigur Jørgen Niclasen, ið ikki útihýsir møguleikanum hjá Jógvan við Keldu aftur at gerast landsstýrismaður**

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Jógvan við Keldu saknar framvegis eina orduliga grundgeving frá sínum flokki fyri, hví hann varð koyrdur frá sum landsstýrismaður við innlendismálum fyri einum góðum hálvum ári síðani. Tað kom fram í Sosialinum í gjár.

Sambært Jógvani við Keldu var almenna grundgevingin frá formanninum í tingbólkinum, Jørgeni Niclasen, at flokkurin ynskti at loyva nýggjum fólkafloksskreftum í Norðuroyggjum framat, nú Jógvan við Keldu fleiri ferðir hevði boðað frá, at hann ikki stillaði upp aftur til næsta løgtingsval.

Men har komu ongar norðoyarkreftir til. Tvørtur ímóti. Ein suðuroyingurin fekk sessin, og Jákup Mikkelsen úr Klaksvík mátti víkja fyri Jógvani við Keldu, sum tók sæti aftur í løgtinginum.

Men Jørgen Niclasen minnist seg ikki hava nevnt eina tílíka grundgeving.

- Tað er sjálvandi pástandur móti pástandi. Men sum eg minnist tosaðu vit einans um at loyva nýggjum kreftum til. Eg nevndi ongantíð nakað øki, sigur Jørgen Niclasen.

Hann leggur dent á, at avgerðin at koyra Jógvan við Keldu frá kom frá Fólkaflokkinum.

- Avgerðin var okkara. Vit blivu ikki trýstir. Hvørki av hinum samgongulimunum ella løgmanni. Flokkurin metti tað vera skilagott og sunt fyri flokkin at gera eina rokadu mitt í valskeiðinum. Endamálið var ongantíð at fjerna mannin, sigur formaðurin fyri tingbólkin hjá Fólkaflokkinum.

Hann sigur seg hava stóra virðing fyri Jógvani við Keldu – bæði sum landsstýrismann og løgtingsmann.

- Eg havi ongantíð ivast í hansara dygdum. Men hann hevði eitt trupult øki at umsita. Útlendingamálið lá í ruinum, tá hann kom í landsstýrið, og tíverri fekk landsstýrismaðurin alla lortaspannuna. Tað hevði hann ikki uppiborið. Nú má tíðin bara vísa, um okkara avgerð var hin rætta, heldur Jørgen Niclasen.



*- Persónliga haldi eg tað vera best, um samgongutinglimir hildu innanhýsis kritikk innanveggja. Men onkursvegna skilji eg væl Jógvan við Keldu, sigur Jørgen Niclasen*

**Jørgen Niclasen**

Í Sosialinum í gjár legði Jógvan við Keldu ikki fingrarnar ímillum, hvat hann helt um Jóannes Eidesgaard, løgmann.

- Hann er ein veikur løgmaður, segði Jógvan við Keldu, ið eisini heldur, at løgmaður ræðist fjølmiðlarnar.

Jørgen Niclasen vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til hørðu atfinningarnar frá Jógvan við Keldu.

- Tað má hann sjálvur svara fyri. Men persónliga haldi eg tað vera best, um samgongutinglimir hildu innanhýsis kritikk innanveggja. Men onkursvegna skilji eg væl Jógvan við Keldu. Hann var jú sjálvur út fyri hørðum atfinningum frá samgongulimum, tá hann sat sum landsstýrismaður.

Sambært Jógvani við Keldu sjálvum, væntar hann ikki at síggja seg í nøkrum landsstýrissessi í framtíðini. Jørgen Niclasen er kortini ikki so konsekventur.

- Hatta var ein rokada. Har var einki rok. Tí er einki í vegin fyri, at hann aftur kann koma í landsstýrið einaferð í framtíðini, heldur Jørgen Niclasen.

# Løgmaður: - Eg eri eingin uppdragari

**- Eg havi ongantíð trýst Jógvani við Keldu til nakað sum helst. At ein samgongulimur hevur hug at niðurgera mín persón kann eg ikki gera nakað við. Eg eri eingin uppdragari, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, um hvøssu atfinningarnar frá Jógvani við Keldu**

*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

- Hann er ein veikur løgmaður. Hann vil helst hava frið. So skjótt ófriður liggur fyri framman, bakkar hann.

Hvøssu orðini eigur Jógvan við Keldu, sum í samrøðu við Sosialin í gjár ikki legði fingrarnar ímillum at siga sína hugsan um løgmann

Sambært fyrrverandi landsstýrismanninum við innlendismálum vóru spenningar millum seg og løgmann longu frá fyrsta degi, tá landsstýrið varð skipað. Jógvan við Keldu nevndi ein fund, har Jóannes Eidesgaard vildi hava seg til at gera nakað, sum hann ikki vildi ganga við til. Júst hvat hetta málið snúði seg um, vildi Jógvan við Keldu ikki koma nærri inn á.

- Komandi dagarnar trýsti hann meg, segði Jógvan við Keldu við Sosialin í gjár.

**Hóttanin var eitt tilboð**

Men løgmaður heldur seg ikki hava trýst nakran.

- Eg havi ongantíð trýst hann til nakað sum helst. Málið, sum Jógvan við Keldu helst meinar við, snýr seg um eitt tilboð, sum hann ikki tók av, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jógvan við Keldu fekk bjóðað at fáa ein leiðara tilførdan til løgfrøðiligu deildina hjá Innlendismálaráðnum. Talan var um Sólju í Ólavsstovu. Men landsstýrismaðurin takkaði nei, og Sólja í Ólavsstovu fekk starv í Fiskimálaráðnum.

- Tað var so hansara avgerð. Vit hildu, at hon var væl egnað. Nú er hon løgtingsins Umboðsmaður, og tað sigur ikki so lítið, sigur Jóannes Eidesgaard.

**Eingin uppdragari**

Løgmaður hevur ikki nógvar viðmerkingar til hvøssu atfinningarnar frá Jógvani við Keldu.

- At ein samgongulimur hevur hug at niðurgera mín persón, kann eg ikki gera nakað við. Eg eri eingin uppdragari. Og eg havi heldur ikki hug at viðmerkja tílíka niðurgerðan. Tað má standa fyri hansara egnu rokning.



*- Eg havi ongantíð trýst hann til nakað sum helst. Málið, sum Jógvan við Keldu helst meinar við, snýr seg um eitt tilboð, sum hann ikki tók av, sigur Jóannes Eidesgaard.*

Men eg kann ugga meg við, at har eru aðrir samgongulimir, ið ikki halda tað sama sum hann. Hann bleiv jú koyrdur frá í samráð við Fólkaflokkin, leggur Jóannes Eidesgaard afturat.